

# Fyrst og fremst Eysturoyggin

**Ein fótbóltshøll í Eysturoynni eigur at hava fremsta prioritet, um føroyskur fótbóltur skal mennast. Samstundis verður skaptur ein risa síðuvinningur til mentanarlívið**

JÁKUP MØRK
*Ítróttaskrivari*

Tað eru nærum tvey ár síðani, at Fótbóltssambandið gjørdi av, at ætlaða hallarprojektið, sum FSF fer at stuðla við á leið 12 mió kr., skuldi verða tað í Skálabotni.

At verulig gongd ikki er komin á projektið enn, kunnu tað helst verða nógvar orsøkir til. Men tað eigur at seta gongd á allar alarmklokkur, tá boðini nú eru, at tað mest sannlíkt ikki verður talan um leingja freistina til samtakið handan høllina. Freistina at framleggja alt skjalatilfar, har tað í løtuni verður sagt, at tað er bert eitt svar um fíggjarpartin hjá landinum, sum nú restar í. Men har mentamálaráðharrin samstundis hevur givið til kennar, at verður sera trupult at finna neyðuga peningin innan fíggjarligu karmar hansara.

## Havnin fær sítt

Eitt er, at tað er spell, at ein slík ætlan møguliga dettur niðurfyri.

Annað er – og tað er í mínum hugaheimi nógv vandamiklari – at avleiðingin kann vera, at FSF avlýsir ætlanirnar um at nýta UEFA-milliónirnar til eina fótbóltshøll, men heldur til annað endamál. Nakað sum møguliga er í ferð við at henda.

Av náttúrugivnum ávum ber illa til at venja og spæla fótbólt alt árið í Føroyum. Tí hevur ein fótbóltshøll í fleiri ár staðið ovast á ynskilistanum hjá teimum, sum arbeiða við menning av føroyskum fótbólti.

Hóast havnarmaður við stórum H – um enn røtur eisini eru av eystara armi av Skálafjørðinum – so var eg millum teirra, sum fegnaðust um, at avgerð varð tikin um at stuðla eini høll í Eysturoynni. Sjálvur helt eg kanska, at við teimum íløgum, sum longu eru gjørdar í infrakervi og stadionumhvørvi annars, so var Svangaskarð kanska bíligari møguleikin her, men sakkunnleikin í FSF valdi høllina í Skálabotni framum, og tað hava tey helst eisini havt sínar orsøkir til.

Men fyri meg var altavgerandi spurningurin í hesum, at høllin lá uttan fyri høvuðsstaðin. Við einum komandi Skálafjarðartunli verður ferðatíðin úr Havnini kortini ikki longur, enn hon er til arbeiðis hjá teimum, sum skulu úr eitt nú Hoyvík oman í býin. So tann parturin í sjálvum sær verður neyvan nakar trupulleiki.

Men fremst av øllum, so er tað púrasta logiskt, at ein høll kortini kemur fyrr ella seinni í Havn. Og sum tað vísir seg, nú Stóratjørn er ávegis, so helst fyrr. Og eins logiskt er tað, at tað neyvan verður talan um nakra høll aðra staðni í landinum, kemur tann í Havnini fyrst. Og tað vildi verið stórt spell fyri fótbóltin, um talan í allar ævir bert verður um tí einu høllina.

So boðskapurin er klokkuklárur. Er Skálabotnur besta loysnin, so gerið høllina har. Er tað ikki møguligt, kanni so, um tað møguligt á Svangaskarði!

## Ikki bert til fótbólt

Og so kann bara leggjast afturat, at tað als ikki bert verður fótbólturin, sum kemur at fáa gleði av einum somikið stórum projekti, sum eitt innandura fótbóltsstadion er. Á Svangaskarði kundi ein slík verið tann perfekti karmurin um mongu legurnar og samkomurnar, sum eru har um summarið. Bæði sum alternativ hýsing, tá føroyska veðurlagið argar, ella sum ein møguleiki at havt líknandi tiltøk nógv størri part av árinum. Og hvussu kundi tað ikki ment Fjarðafestivalin, um høllin ístaðin lá í Skálabotni.

Framvegis verður hetta ikki sagt fyri at taka nakað stað framum. Men bert fyri at vísa á nakrar fáar av teimum óteljandi mentanarligu møguleikunum, sum ein slík høll vildi borið við sær. Møguleikan at skipa fyri eini rimmarkonsert við stórum útlendskum nøvnum, uttan at fyrireikararnir í mánaðir skulu ganga hjartkiptir av ræðslu, tí hvat nú, um veðrið verður vánaligt. Snøgt sagt ein møguleiki at leingja árstíðina til at fevna um alt árið fyri ein stóran part av føroyska upplivingarbúskapinum.

Og tá talan samstundis er um íløgu, sum við vanligum og skilagóðum viðlíkahaldi helst røkkur hálva øld fram í tíðina. So skuldu allar góðar orsøkir verið til at finna saman um bestu loysnina og føra hana fram á mál.